# Nýggjur cafeteriavertur

**Fyrsta oktober tekur Hotel Lonin á Eiði yvir í cafeteria á flogvøllinum í Vágum**




*Cafeteria á flogvøllinum í Vágum fer at skifta vert tann 1. oktober*

*Mynd: Edvard Joensen*

MATGERÐ
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Tað verður nýggjur vertur, sum fer at standa fyri cafeteria á flogvøllinum eftir 1. oktober. Hannis Egilsnes gevst, og Hotel Lonin á Eiði tekur við.

– Vit ætla at broyta innihaldið nakað, sigur Frank Nielsen á Hotel Lonini. vit fara at leggja okkum eftir at gera meira burtur úr sjálv, sigur hann. Fara at hava eitt nú smurt breyð við føroyskum viðskera. Og kanska einaferð seinni eisini geva fólki møguleika fyri at fáa ein búff. Hvør veit?

Fólk, sum koma á flogvøllin í samband við fyrrapartsruturnar fara ikki at merkja ta øgiliga stóru broytingina beinanveg. Tað veru tað vanliga við morgunmati, sum er at fáa allastaðni, og sum tey eisini hava fingið á flogvøllinum í Vágum. Men tað verður vónandi so, at vit kunnu gera meira burtur úr til teirra, sum sita og bíða ein seinnapart.

Ikki tað, at nakað er endaliga avgjørt enn, sigur hann. Talan er enn bara um ætlanir. Men tey vilja royna at gera ymsar broytingar so við og við og so síggja, hvat fólk halda um tað. Vil fólk so heldur hava tað, sum tað er, ja so fara vit at rætta okkum eftir tí, sigur hann.

Tá Sosialurin tosaði við Frank Nielsn, hevði hann enn ikki tosað við starvsfólkið í avgreiðsluni. Men hann ætlar at gera tað fyrsta dagin, sigur hann, fyri at frætta, um tey møguliga eru áhugað í at halda fram. Sum skiltist á honum hevði hann hug at bjóða teimum tann møguleikan.

# Væleydnað

**Ferðavinnustevnan Vestnorden Travel Mart, sum varð hildin í Havn í seinastu viku, eydnaðist sera væl. Ferðaráðið hevur bara fingið positivar afturmeldingar, sigur stjórin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Tað er ein væl nøgdur ferðavinnustjóri, sum ger upp eftir ferðavinnustevnuna Vestnorden Travel Mart, sum Ferðaráð Føroya var vertur fyri í seinastu viku.

–Vit hava bara fingið positivar afturmeldingar, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya. Frá bæði keyparum og seljarum umframt frá teimum myndugleikum, sum vara av tiltakinum. Her verður hugsað um leiðsluna fyri Vestnorden Travel Mart, sum nevnd verður WTB, Westnorden Travel Board.

Heri Niclasen fegnast um, at tiltakið eydnaðist væl í øllum lutum. Enn hevur einki verið funnist at í øllum tí, tey hava frætt aftur, sigur hann.

Hann metir sjálvur, at tað gekk eisini væl frá byrjan. Ein góð móttøka av femmandu gestunum ger, at tey fáa eina positiva støðu frá fyrsta stigi á føroyskari jørð. Ikki minni umráðandi er, at gistingarmøguleikarnir hjá frammandu gestunum eru í lagi.

### Móttøka og gisting

Fólk frá Ferðaráðnum tók í móti á flogvøllinum og syrgdi fyri at øll komu upp á pláss beinanveg, tey komu til Føroya. Hotellini í Havn tóku í móti og Norrøna lá við bryggju og hýsti ikki færri enn 249 stevnuluttakarum. Eisini har umborð gekk alt upp á stás, sigur Heri Niclasen.

At Norrøna lá við bryggju sum hotelskip hevði dupulta ávirkan, um ein kann siga so, vísir Heri Niclasen á. Hann takkar í fyrsta umfari Smyril Line fyri at taka tríggjar dagar burtur úr feðaætlanini og leggja skipið til sum gistingarhús á stevnuni.

Í øðrum lagi var hetta ein frálíkur møguleiki hjá Smyril Line at lýsa við hesum frálíka nýggja skipinum. Tí júst hesi fólkini, sum vóru á Vestnorden Travel Mart eru tey, sum keypa og selja ferðir í Útnorði. Og Norrøna flytir ein stóran part av kundunum hjá hesum fólkunum.

Eitt annað av gistingarhúsunum í landinum, sum Heri Niclasen serliga nevnir, er Hotel Vágar, sum stóð fyri matgerð og pynti í samband við samansjóðingina mánakvøldið. Tað tey á fremmandum málið nevna »Get together«.



*Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya - her saman við Birnu Jacobsen, samskipara - er sera fegin um Vestnorden Travel Mart, sum var í Føroyum í seinastu viku. Alt gekk sum eftir ánni, letur hann at*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Heri Niclasen er ikki smæðin, tá hann umrøður hesa samansjóðingina, sum hann heldur vera eina ta bestu, hann hevur verið við til yvirhøvur í samband við Vestnorden Travel Mart. Eisini útlensku gestirnir hava havt hetta á orði, sigur hann. Tey rósa umstøðunum, tiltakið varð hildið undir á forngripasavninum í Hoyvík. Har var gott pláss, og alt andaði av mentan og hugna, taka tey til.

### Tiltakið

Sjálvt tiltakið í ítróttarhøllini á Hálsi var eisini stórt og væleydnað, láta fólk at.

Seinasta Vestnorden Travel Mart stevnan, sum varð hildin í Føroyum, var í 1999. Tá vóru fleiri básar og fleiri luttakandi fyritøkur. Men sjálvt luttakartalið, tá vit tosa um fólk, var júst tað sama hesaferð sum seinast. 385 fólk í tali, upplýsir Heri Niclasen.

Tað vórðu settir 110 básar upp í høllini, har stevnan var. Umframt varð so okkurt annað tiltak, sum eit nú kunngerðingin av, hvør var best røkta bygd í landinum, lagt inn á stevnuna eisini.

Hetlendingar, sum vóru við sum eygleiðarar fyrstu ferð, máttu taka til takka við at hava bás í gongini. Men tað tóktust teir eisini at vera nøgdir við, sigur Heri Niclasen.

Forrætningsmessiga riggaði tað væl í ítróttarhøllini. Tað andaði og livdi alla staðni. Fólk gingu runt og gjørdu avtalur, prátaðu og hugnaður sær.

Tað, sum nú verður gjørt, sigur Heri Niclasen, er at eftirmeta tiltakið. Eitt nú at gera spurnarbløð at senda luttkarunum. Eisini ætlar hann at hava ein fund við føroysku ltttakararnar at vita, hvat teir halda um tiltakið, og hvat teir fingu burtur úr sum heild.

Ferðaráð Føroya var væl fyrireikað undan stevnuni, sigur Heri Niclasen, og tað var avgjørt ein av orsøkunum til, at tað gek so væl. Starvsfólkið á Ferðaráðnum og samskiparin av stevnuni, Birna Jacobsen, fáa bert rósandi orð frá stjóranum, nú liðugt er.

Ferðaráðið er ein tænastustovnur, sum skapar sambond og heldur viðlíka. Tær einstøku avtalurnar gera ymsu feløgini, sum bjóða seg fram. Tað er eisini har, leitast skal eftir ítøkiligum avtalum og handlum á slíkari stevnu, sigur ein vælnøgdur ferðavinnustjóri.



# Eskild og Jóannes fiskikongar

**23 bátar luttóku í fiskikappingini, sum var norðan fyri leygardagin. Hóast tað sá út til at vera av fagrasta veðri, lotaði so mikið, at ikki bar til at fara út um endarnar**



*Tað var bæði hugnaligt og spennandi at koma á støð leygardagin, tá menn komu aftur av útróðri*

FISKIKPANNING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað er stuttligt og spennandi at vera við á eini fiskikapping. Teir, sum royna seg, eru oftast menn, sum ikki søkja sjógvin dagliga, men hava tað til ítriv at vera á floti av og á.

Teir, sum burturav liva av útróðri, eru ikki so nógv við í hesum kappingum og serliga ikki, tá ið streymloysa er, sum hendan dagin, Dragin skipaði fyri fiskikapping.

Tað eru heldur ikki altíð teir royndu, sum fáa mest burtur úr ein slíkan dag, tí tað kann vera ræţtiliga tilvildarligt, hvør dettur á nakrar fiskar hesar tímarnar, kappingin varir.

Menn, sum nýliga hava verið á floti, vita kanska, hvar nakrir fiskar kunnu standa, meðan aðrir, ið ikki hava verið á báti leingi, mugu leita seg fram.



*Eskild Hansen og Jóannes Joensen, á bátinum, Saga, gjørdust nummar 1. Teir fiskaðu 217 kilo*

### Øðrvísi dagur

Fiskikapping hevur verið hildin í mong ár, og er tað ein øðrvísi og hugnaligur dagur hjá monnum, sum fáast við at fiska; og tað er altíð spennandi at vita, hvørjum eydnast at verða bestir.

Í ár vóru tað teir báðir, Eskild Hansen og Jóannes Joensen, á bátinum, Saga, ið vunnu. Teir fiskaðu 217 kilo, og fingu teir ferðasteyp og steyp til ognar.

Næstir teimum vóru brøðurnir Palli og Elmar Simonsen við 196 kilo, og nummar 3 gjørdust, Per Joensen og Richard Johannesen við 163 kilo.

Elias á Lágni fekk størsta fiskin, og fekk hann steyp til ognar.

Tað var stuðulsfelagið hjá skúlaskipinum, Draganum, ið skipaði fyri fiskikappingini.

Teir, ið vóru við í fiskikappingini, fingu kaffi og pannikøkur umborð á Draganum, tá komið var at landi. Um kvøldið var almennur dansur í Skálanum til frama fyri Dragan.

# Grønlendska heimastýrið liggur í buktini

**- Avtalan, sum føroysk rækjuskip hava gjørt við grønlendsk reiðaríir, kemur ikki uppá pláss í ár. Tað hava vit fingið at vitað úr Grønlandi, sigur Petur Jacobsen, reiðari**

RÆKJUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilnund@sosialurin.fo*



*Føroysk rækjuskip sleppa ikki at fiska av keyptum kvotum í grønlendskum sjógvi í ár - eins og tey gjørdu í fjør. Grønlendska heimastýrið liggur í buktini og vil ikki góðkenna avtalur, sum føroysk og grønlensk reiðaríir hava gjørt*

Seinastu árini hevur staðið í fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland, at reiðaríir í báðum londunum kunnu gera avtalur um keyp av ófiskaðum kvotum hjá hvørjum øðrum.

Í fjør keyptu føroysku reiðaríir, sum eiga rækjuskip, soleiðis kvotur frá grønlendskum feløgum og fiskaðu hesar í grønlendskum sjógvi.

Aftur í ár eru slíkar avtalur gjørdar, men enn eru tær ikki komnar uppá pláss, og tað koma tær eftir øllum at døma heldur ikki. Grønlendska heimastýrið vil nevniliga ikki góðkenna avtalurnar í ár, tí heimastýrið heldur tað ikki vera rætt, at grønlendsk reiðaríir biðja um meira kvotu, samstundis sum kvotur verða seldar føroyskum skipum.

### Stóran týdning

Petur Jacobsen, reiðari á Sólborg, sigur, at føroysku reiðaríini hava fingið at vitað úr Grønlandi, at tey ikki sleppa at fiska av keyptum kvotum í ár.

Í fjør keypti og fiskaði Sólborg 500 tons, og Arctic Viking keypti og fiskaði eisini kvotur í grønlendskum sjógvi.

Herfyri segði Bjarni Petersen, skipari á Arctic Viking, í samrøðu við Sosialin, at slíkar avtalur kunnu verða við til at bjarga árinum hjá teimum.

Men nú er so greitt, at hóast hesar avtalur eru møguligar í fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland - og aftur í ár eru gjørdar millum føroysk og grønlensk feløg - so sleppa føroysk rækjuskip kortini ikki at fiska av keyptum kvotum í grønlendskum sjógvi í ár.

Sostatt verða tað ikki hesar avtalur, sum koma at bøta um støðuna hjá nøkrum føroyskum rækjuskipi í ár.